### 2.3.2 Upplýsingar um útrokning av ÁKP undir "nýttum hátti" í Kostnaðarroknskapinum

Viðvíkjandi útrokning av ÁKP skal í minsta lagi hetta upplýsast í "nýttum hátti" í Kostnaðarroknskapinum:

*"ÁKP hjá hvørjum einstøkum kunda (limi) er roknað sum lutfallið millum ÁKK hjá kundanum (liminum) og uppsparingina ultimo hjá kundanum (liminum) (+ tann partin av møguligum ikki býttum avsetingum, sum kundin (limurin) eigur) tó soleiðis, at hædd verður tikin fyri, at ultimo uppsparingin hjá einum kunda (limi) kann stava frá bæði skattaðum og óskattaðum inngjøldum. Í hesi útrokning eru nakrar metingar gjørdar, sum eru eins fyri allar kundar (limir) og fyri øll eftirlønarfeløg og -grunnar. Hesar metingar eru ein roynd at vísa veruligu viðurskiftini, men hetta kann ikki gerast til fulnar, og tí kunnu munir vera millum, hvussu neyvt ÁKP lýsir kostnaðarprosentið hjá hvørjum einstøkum kunda (limi)."*